GJALDSTOVAN

# Fylgiskjal A

Kravfesting

## Innihald

1. Útboð viðvíkjandi røkt av akførum hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum ...... 3
   a. Yvirskipað ........ 3
   b. Nýtsluøki ........ 3
   c. Yvirlit yvir akfør hjá Almannaverkinum ........ 3
   d. Orðagreining og styttingar ........ 3
2. Kravfesting ........ 5

# 1. Útboð viðvíkjandi røkt av akførum hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum

## a. *Yvirskipað*

Gjaldstovan vil vegna Almannaverkið geva tykkum møguleikan at bjóða uppá røkt av akførum hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum.

Hetta útboðið fevnir um røkt av akførum hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum, ið eru fevndir av rundskrivi nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum.

## b. *Nýtsluøki*

Henda kravfesting lýsir nýtsluøki og karmarnar fyri komandi sáttmálan. Harumframt lýsir kravfestingin krøvini til tær vørur og tænastur, ið sáttmálin fevnir um.

Sáttmálin fevnir um fylgjandi vørur og tænastur:

- Keyp- og skift av olju
- Keyp- og skift av dekkum
- Verkstað
- Koyring til og frá verkstaði

## c. *Yvirlit yvir akfør hjá Almannaverkinum*

Yvirlit yvir akfør hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum, sum skulu haldast:

- Fylgiskjal D - Yvirlit yvir akfør hjá Almannaverkinum

## d. *Orðagreining og styttingar*

Øll krøv eru býtt sundur í "minstukrøv" ella "góðskukrøv" í teiginum fyri flokking. Minstukrøv eru frámerkt við "M". Góðskukrøv eru frámerkt við "G".

| Flokking | Lýsing |
|---|---|
| M | Tilboðsgevari skal lúka minstukrøv. Tilboð verður ikki ein partur av eftirmetingini um minstukrøv ikki eru uppfylt. |
| G | Krøv til eftirmeting. Hesi krøv verða eftirmett av Gjaldstovuni. |

Í teiginum “Skjalfesting” er ásett fyri hvørt krav, hvussu tilboðsgevari skal lýsa ella skjalfesta lúkan av kravinum. Tað er møguligt at áseta fleiri flokkar fyri hvørt krav. Flokkarnir eru sum fylgjandi í teiginum “Skjalfesting”:

| Skjalfesting | Lýsing |
|---|---|
| J/N | Tilboðsgevari skal svara J (Ja) ella N (Nei) til, um kravið er uppfylt. T.d. við at knýta eina viðmerking afturat. Legg til merkis, at um kravið er eitt minstakrav, so vil eitt noktandi svar (t.e. Nei) bera við sær, at tilboðið verður burturvíst. |

Tilboðsgevari skal í teiginum “Lúkan av krøvum” svara, um kravið er uppfylt. Ein frágreiðing, um hvussu tilboðsgevari kann liva upp til kravið, kann ásetast í teigin “Viðmerkingar hjá tilboðsgevara”.

Tað er avgerandi, at tað fyri minstukrøv verður svarað J (ja) í teiginum “Lúkan av krøvum”.

## 2. Kravfesting

| Nr. | Lýsing av krøvum | Flokking | Skjalfesting | Lúkan av krøvum | Viðmerkingar hjá útbjóðara | Viðmerkingar hjá tilboðsgevara |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Keyp og skift av olju** | | | | | | |
| 1. | **Skift av olju**<br>Veitarin skal skifta olju á akførum, um akfør hava koyrt yvir 5.000 km., ella um tað er 1 ár síðan, at olja er skift seinast. | M | J/N | | *Møguleiki at skifta olju og dekk samstundis.* | |
| 2. | **Góðska á olju**<br>Oljan skal liva upp til fyridømi, sum víst verður til í handbók fyri hvørt einstakt akfar. | M | J/N | | | |
| **Keyp og skift av dekkum** | | | | | | |
| 3. | **Skift av dekkum**<br>Veitarin skal skifta dekk fyri hvørt einstakt akfar tvær ferðir um árið. Hetta inniheldur eisini ásetan og balansering av dekkum v.m. | M | J/N | | *Við hesum verður sipað til summar- og vetrardekk. Krøv til mynsturdýpd á summar- og* | |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | *vetrardekkum sæst í kunngerð nr. 59 frá 5. mai 2021 um nýtslu av dekkum.* | |
| 4. | **Góðska á dekkum**<br>Veitarin skal tryggja, at góðskan á dekkunum livir upp til góðskuna á merkjunum *Michelin*, *Goodyear* og *Continental ella líknandi*. | M | J/N | | *Við "ella líknandi" verður sipað til nýggj dekk frá øðrum merkjum enn teimum nevndu, men við somu støðd, slagi, brennievniskostnaði, vegtaki og dekkóljóði.* | |
| 5. | **Støðd, profilur og diametur á dekkum**<br>Keyparin skal hava atgongd at keypa dekk í øllum støddum, profilum og diametur, sum passa til akførini í Fylgiskjal D. | M | J/N | | *Yvirlit yvir akfør hjá Almannaverkinum sæst í Fylgiskjal D.* | |
| 6. | **Goymsla av dekkum**<br>Veitarin skal hava eitt dekk hotell til goymslu av dekkum. | M | J/N | | *Tey flestu akførini koma at hava eitt sett av dekkum á dekk hotelli hvørt hálvár.* | |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. | **Burturbeining av dekkum**<br>Veitarin skal hava møguleika at burturbeina dekk, um dekk eru slitin og tískil ikki kunnu endurnýtast. | M | J/N | | *Burturbeining av dekkum er íroknað prísinum fyri skift av dekkum, sbrt. Fylgiskjal C – Veitarans prísir.* | |
| **Verkstaður** | | | | | | |
| 8. | **Verkstaður**<br>Veitarin skal hava eitt tøkt verkstað til skift av olju og dekkum. | M | J/N | | | |
| 9. | **Verkstaður**<br>Keyparin skal vera VIP kundi soleiðis, at keyparin til eina og hvørja tíð hevur fremstu raðfesting. | M | J/N | | | |
| 10. | **Verkstaður**<br>Keyparin skal hava ein fast knýttan ábyrgdara, ið hevur ábyrgd av akførunum. | M | J/N | | | |
| **Koyring til og frá verkstaði** | | | | | | |
| 11. | **Koyring til og frá verkstaði**<br>Veitarin skal hava møguleika at koyra akfør til og frá verkstaði. | M | J/N | | | |

| Aðrar tænastur | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. | **Aðrar tænastur**<br>Veitarin kann sjálvboðið bjóða aðrar tænastur. Hetta kann til dømis vera rustviðgerð, reingerð, leigan av akførum v.m. | G | J/N | | *Gjaldstovan gevur karakter fyri aðrar tænastur, sum partur av góðskumetingini.*<br><br>*Vinarliga greið frá hvørjar aðrar tænastur tit veita í teiginum "Viðmerkingar hjá tilboðsgevara" í Fylgiskjal B - Veitarans tilboð.*<br><br>*Vinarliga fylli út prísir fyri aðrar tænastur í Fylgiskjal C - Veitarans prísir.* | |